**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0716**
**Tíðarskeið 7-21/03 2007**

**Fólk frá FRS.:** Hallur Joensen , Mourits M. Joensen, Rógvi Mouritsen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av vár-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Haraftrat skulu magar takast regluliga av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til aldursgreining av havtasku og svartkjafti skal fáast til vega. Eisini skal gulllaksur frystast til nærri kanningar í landi.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Kanningarøki:** Trolstøðirnar eru lagdar kring allan landgrunnin grynri enn 500 m, sí mynd 1. Hetta eru støðir, ið eru tiknar á hesum báðum túrunum í vár, t.e. bæði á seinasta túri (0712) og á hesum túrinum (0716), umframt nakrar írestandi støðir, ið vórðu tiknar á túri 0720.




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á vári við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 100 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Av teimum íalt 100 trolstøðunum, ið verða tiknar á yvirlitstrolingunum á vári, vórðu 55 støðir tiknar fyrra túrin; sostatt vóru 45 støðir eftir at taka á hesum túrinum. Sera vánaligt veður var á at kalla øllum túrinum, og darvaði hetta arbeiðnum í stóran mun. Byrjað varð at fiska innarlaga á Fugloyartungu (øki 5) fríggjamorgunin 9/3; um kvøldið varð ein skurður tikin við termistorketu. Síðan varð hildið fram vestur eftir norðanfyri. Mánadagin 12/3 var ikki roynandi fyri veður, og fóru vit tí á Klaksvík at landa. Týsdagin hildu vit so fram norðan- og vestanfyri. Fríggjadagin 16/3 krokaðu vit allan dagin eystan fyri Suðuroynna. 17/3 vórðu 6 trolstøðir tiknar á Munkagrunninum, umframt at ein svívari varð tikin upp; men so øtlaði hann veðrið aftur. Vit valdu tí at sigla undir Vágoynna at kroka. Sunnudagin 18/3 fingu vit bert 2 støðir, og mánadagin var ikki roynandi. Týsmorgunin bar aftur til. Fyrst vórðu tær seinastu 4 støðirnar vestanfyri tiknar, og so varð hildið suður á Munkagrunnin, har vit kláraðu 1 støð aftrat. Tískil lógu 6 støðir eftir, sum vit ikki fingu, áðrenn túrurin var liðugur. Hesar vórðu tiknar fyrst á næsta túri (0720), áðrenn hildið varð út á Føroyabanka. Síðan varð siglt á Havnina, har vit komu umleið kl. $03^{30}$ mikumorgunin; byrjað varð at landa sama stað kl. 08. Íalt vórðu gjørd 44 hál, av tí at 5 hál miseydnaðust, tí trolið reiv/gjørdist fast.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært sýnishandbókini og kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum av ávikavist toski, hýsu, upsa og havtasku sæst í talvu 1 niðanfyri. Eingin svartkjaftur varð fingin á túrinum, men nakrar vórðu tiknar á teimum støðunum, ið restaðu í á Munkagrunninum; hesar eru við í Talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar av toski, hýsu og upsa tiknir og kannaðir umborð. Nakað av gulllaksi varð fryst til nærri kanningar í landi.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 0716.

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 529 | 109 | 453 | 100 | 515 | 81 | 6 | 6 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 1509 |
| Tal á magum tilsamans: | 290 |

**Nær verða prøvarnir upparbeiddir:** Veiðutølini frá túrinum eru rættað, og ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og øll data innløgd í databasu sum skjótast, helst áðrenn 10. apríl.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrunum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á vári í ár, men nøkur ávegis úrslit skulu takast fram. Tað viðraði sera illa á báðum túrunum í ár, og skulu úrslitini tí takast við einum ávísum fyrivarni. Talva 2 vísir yvirlit yvir veiðuna av teimum ymsu fiskasløgunum á hesum túrinum (og 6 írestandi støðir tiknar á túri 0720); 36 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt mathøgguslokk, *eledone* (høgguslokkaslag), agnhøgguslokk og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Í somu talvu sæst eisini, á hvussu nógvum støðum, tey einstøku fiskasløgini eru fingin, t.e. hvussu vanlig tey eru. Nógv mest varð fingið av hýsu, og síðan koma ávikavist toskur, upsi og hvítingsbróðir. Hýsa og toskur vórðu fingin á 97% av støðunum, upsi á 89%, lítli kongafiskur á 78% og tunga á 73%.

Um allar støðirnar í vár verða lagdar saman, fæst ein heldur øðrvísi mynd (Talva 3). Á teimum 100 støðunum vórðu veidd 46 ymisk fiskasløg, ið er nakað fleiri enn vanligt; umframt vórðu hummari, 4 sløg av høgguslokki og skrambul fingin. Nógv mest var av hýsu, og síðan koma ávikavist hvítingsbróðir, toskur, upsi og lítli kongafiskur. Hýsa varð veidd á 95% av støðunum, toskur á 86% og upsi og lítli kongafiskur á 80%.

Størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa; men eisini fyri onnur sløg fast ein ábending um, hvussu nógv er til. T.d tykist serliga hvítingsbróðir, men eisini lítli kongafiskur at vera heilt væl fyri, meðan nógv minni varð fingið av svartkjafti í mun til í fjør. Somuleiðis vóru nøgdirnar av gulllaksi, havtasku, reyðsprøku og tungu minni í ár. Nevnast skal eisini, at mathøgguslokkur, ið annars bert plagdi at vera á Føroyabanka, nú hesi seinastu árini er vorðin alt vanligari á landgrunninum. Hetta samsvarar væl við fráboðanum frá trolarum og garnabáti, ið rouna á landgrunninum, um, at nógv hylki við rognum frá mathøgguslokki hanga í reiðskapinum.

Á myndunum 2-4 sæst fyri ávikavist hýsu, tosk og upsa veiða upp á roynd frá yvirlitstrolingunum á vári (allar 100 støðir) saman við mettu stovnsstøddini av somu fiskasløgum. Veiða upp á roynd er vanliga eitt mát fyri, hvussu stórir stovnarnir eru í vekt; hóast nøkur frávik, so fylgjast farstrikurnar fyri yvirlitstrolingarnar og stovnarnar væl fyri hýsu og tosk. Orsøkir til frávikini eru m.a., at einstøk stór hál á yvirlitstrolingunum fáa ov stóra vekt, og at ikki allir aldrar á fiski eru líka væl umboðaðir í yvirlitstrolingunum. Tølini fyri upsa skulu tó takast við stórum fyrivarni, tí slíkar yvirlitstrolingar vísa seg at vera rættuliga óneyvar fyri upsa; hetta skyldast m.a., at upsi ofta gongur í torvum, og at eldri upsi ofta fer upp í sjógvin.




**Mynd 2**. Veiða upp á roynd fyri hýsu frá yvirlitstrolingunum á vári borið saman við stovnsmetingarnar av hýsu í 2006.

Við tí stóra veiðutrýsti, ið er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórur stovnurin er. Av tí sama er stórur partur av stovninum ungur fiskur. Og bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi. Vøksturin á fiskinum hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu stór stovnsvektin er. Í ár vóru toskurin og hýsan hampuliga væl fyri, meðan upsin yvirhøvur var rakari.




**Mynd 3**. Veiða upp á roynd fyri tosk frá yvirlitstrolingunum á vári borið saman við stovnsmetingarnar av toski í 2006.

Á mynd 3 sæst, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey sera vánaligu kreppuárini, og var orsøkin teir sera góðu árgangirnir frá 1992 og 1993. Eisini hýsa vaks skjótt (Mynd 2), og var tað her 1993- og 1994-árgangirnir, ið skaraðu framúr. Góð tilgongd síðani hevur eisini fingið allar tríggjar stovnar at vaksa aftur, men eftir hesum nýggju kanningum eru teir allir í minking; serliga er tað toskurin, ið er illa fyri, og hann hevur alla vernd fyri neyðini. Akkurát hvussu nógv, toskastovnurin er minkaður, er trupult at gera av bert við støði í hesum kanningunum; toskur savnast á ávísum avmarkaðum leiðum at gýta, og fellur hetta saman við teimum úrvaldu støðunum á mynd 1, verður veiðan samsvarandi stór. Eini 2-3 rættiliga stór toskahál vórðu gjørd í 2005, og var hetta orsøkin til, at farstrikan tað árið kvinkaðist uppeftir; eingi tílík stór hál hava verðið síðani. Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum verða roknað, so at m.a. støddin á nýggjum árgangum kann verða mett. Men umráðandi er, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so at minkingin í serliga toskastovninum kann støðga, og stovnurin við tíðini eisini vaksa.

Fyri hýsu kvinkaðist farstrikan eitt sindur upp í ár (Mynd 2); helst er høvuðsorsøkin vøkstur á fiskinum í vekt. Tann stóra minkingin fyri upsa (Mynd 3) kann stava frá lítlum fiskavøkstri, men sannlíkt er, at tað vánaliga veðrið eisini hevur ávirkað.




**Mynd 4**. Veiða upp á roynd fyri upsa frá yvirlitstrolingunum á vári borið saman við stovnsmetingarnar av upsa í 2006.

<u>Jákup Reinert</u>

**Talva 2. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á túri 0716**
**45 støðir íalt**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|
| Hýsa | 7624.358 | 91 |
| Toskur | 3385.681 | 91 |
| Upsi | 2654.723 | 89 |
| Hvítingsbróðir | 1707.959 | 56 |
| Lítli kongafiskur | 1563.602 | 78 |
| Stóri kongafiskur | 495.885 | 44 |
| Longa | 306.374 | 53 |
| Gulllaksur | 220.933 | 27 |
| Hvítingut | 166.328 | 33 |
| Brosma | 133.602 | 33 |
| Reyðsprøka | 119.841 | 36 |
| Blálonga | 110.756 | 11 |
| Trantkongafiskur | 110.626 | 11 |
| Tunga | 105.084 | 73 |
| Havtaska | 69.601 | 16 |
| Sandsprøka | 39.467 | 44 |
| Kalvi | 33.980 | 33 |
| Blágómur | 29.079 | 2 |
| Knurrhani | 21.727 | 24 |
| Mathøgguslokkur | 18.363 | 38 |
| Halahvassa skøta | 14.860 | 2 |
| Hvítaskøta | 13.870 | 2 |
| Skrambul | 11.965 | 47 |
| Hvassasprek | 11.488 | 20 |
| Steinbítur | 11.265 | 7 |
| Svartkjaftur | 9.456 | 7 |
| Hávur | 8.941 | 4 |
| Rognkelsi | 8.760 | 7 |
| Glaskvoysa | 8.465 | 11 |
| Tindaskøta | 3.944 | 4 |
| Lýrur | 3.690 | 2 |
| Eledone | 1.992 | 4 |
| Sild | 1.542 | 4 |
| Makrelur | 1.264 | 2 |
| Klingruskøta | 0.998 | 4 |
| Glýsufiskur | 0.759 | 2 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 0.539 | 2 |
| Agnhøgguslokkur | 0.508 | 2 |
| Silvurmurtur | 0.138 | 2 |
| Trýnisállur | 0.068 | 2 |

**Talva 3. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á vári 2007**
**Báðir túrar, 100 støðir íalt**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|
| Hýsa | 17513.673 | 95 |
| Hvítingsbróðir | 6399.333 | 62 |
| Toskur | 5955.458 | 86 |
| Upsi | 5236.315 | 80 |
| Lítli kongafiskur | 3480.447 | 80 |
| Gulllaksur | 930.430 | 26 |
| Longa | 835.294 | 57 |
| Stóri kongafiskur | 792.556 | 41 |
| Hvítingur | 716.340 | 43 |
| Svartkjaftur | 568.986 | 16 |
| Knurrhani | 539.654 | 12 |
| Brosma | 394.068 | 41 |
| Reyðsprøka | 380.306 | 37 |
| Havmús | 244.646 | 5 |
| Tunga | 204.052 | 67 |
| Blálonga | 120.561 | 10 |
| Trantkongafiskur | 117.481 | 8 |
| Havtaska | 116.691 | 16 |
| Mathøgguslokkur | 108.035 | 29 |
| Lálla | 103.323 | 5 |
| Skøta | 87.600 | 2 |
| Sandsprøka | 86.421 | 39 |
| Kalvi | 79.150 | 34 |
| Rognkelsi | 67.894 | 7 |
| Silvurmurtur | 64.716 | 4 |
| Skrambul | 54.468 | 39 |
| Hvassasprek | 41.480 | 16 |
| Blágómur | 29.079 | 1 |
| Steinbítur | 19.928 | 7 |
| Kjaftsvarti hávur | 17.794 | 4 |
| Agnhøguslokkur | 16.120 | 8 |
| Halahvassa skøta | 14.860 | 1 |
| Tindaskøta | 14.563 | 5 |
| Haliphron | 14.100 | 1 |
| Glaskvoysa | 14.090 | 7 |
| Hvítaskøta | 13.870 | 1 |
| Búksvarti hávur | 13.522 | 2 |
| Lýrur | 11.730 | 3 |
| Hávur | 8.941 | 2 |
| Svartkalvi | 6.790 | 1 |
| Sild | 5.493 | 7 |
| Lítla brosma | 5.292 | 2 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 4.682 | 2 |
| Úlvfiskur | 3.757 | 1 |
| Liri | 3.370 | 1 |
| Hummari | 2.218 | 2 |
| Eledone | 1.992 | 2 |
| Rossamakrelur | 1.704 | 1 |
| Klingruskøta | 0.998 | 2 |
| Glýsufiskur | 0.759 | 1 |
| Makrelur | 0.606 | 2 |
| Lodna | 0.091 | 9 |
| Trýnisállur | 0.068 | 1 |